# Mín besta uppskrift

LAGT TIL RÆTTIS: Inna Törnroos



UPPSKRIFT: Birita Michelsen

# Ræstur fiskur í fati



| | |
|---|---|
| 2 | ræstir fiskar |
| 1 spsk | av olju |
| 1 | hvítleyksbát |
| 2 | leykir |
| 1 | piparfrukt |
| 1 blikk | av flustum tomatum |
| 100 gr | av rivnum osti |
| | pipar og salt |

til 4 fólk

Skrallað fiskin, sker hann sundur og kóka hann í 10 minuttir. Sker fiskin sundur í minni stykki og legg hann í eitt eldfast fat.

Hakka leyk og hvítleyk smátt. Sker piparfruktina í terningar. Brúnka grønmetið í oljuni og lat flustar tomatir útí og smakkað til við pipari og salti. Stroyð rivnan ost omanyvir og koyr inn í ovnin í uml. 10 min. Ovnurin skal verða uml 200 gradir. Borðreið við rís ella pasta og rákosti.

## MÍN BESTA UPPSKRIFT

er nýggjur teigur í Vikuskiftis Sosialinum, har lesarin kann senda okkum sína bestu uppskrift, saman við mynd av rættinum og navni á kokkinum.

Øll sløg av uppskriftum eru vælkomnar, bæði bakstur, matur og drekka, men tær skulu ikki hava verið almannakunngjørdar áður.

Send tína bestu uppskrift til:
**Sosialurin**
**Postboks 76**
**FO-110 Tórshavn**
**mrk. uppskrift**

Ella til post@sosialurin.fo.

Uppskriftin, sum verður prentað í blaðnum, fær *gávukort á kr. 300,-* frá **Thomas Dam búnýti**



Thomas Dam búnýti

TÓRSHAVN
Niels Finsensgøta 18
tel. 36 30 00

SALTANGARÁ
Heiðavegur 56
tel. 44 76 04

*– Eg vóni, at tað, sum eg skrivi um meg sjálvan, kann siga fólki, sum lesa mínar yrkingar, okkurt um tey sjálvi, sigur Peter Laugesen*



MYND: ÁLVUR HARALDSEN

# Tú kanst ikki renna undan tí ljóta

– TÚ KANST IKKI RENNA UNDAN TÍ LJÓTA OG ÓBEHAGILIGA Í LÍVINUM, SIGUR YRKJARIN **PETER LAUGESEN**. Í HANSARA SKALDSKAPI TRÍVAST TAÐ VAKRA OG TAÐ LJÓTA LIÐ UM LIÐ

YRKJARI
Eyðun Klakstein
eydun@sosialurin.fo

Skaldskapurin hjá virðislønta danska yrkjaranum Peter Laugesen er sermerktur við, at hann brúkar tað vakra og pena saman við tí ljóta og keðiliga. Tað vakra og tað ljóta kunnu ikki skiljast at, tey treyta hvørt annað.

– Tú kanst ikki renna undan tí ljóta og óbehagiliga í lívinum. Roynir tú at gera tað, so manglar tú nógvar av royndunum, sum skulu til fyri at liva eitt vanligt lív. Og ikki minst hjá einum listamanni er neyðugt at uppliva og brúka bæði, sigur Peter Laugesen.

**Men hvat dámar tær betur, pen ella ill orð?**

– Tað er tað sama við orðum. Tey treytað hvørt annað, og eg kann ikki siga, hvat mær dámar betur. Bæði sløg av orðum mugu verða har, ella kunnu vit ikki samskifta ordiligt.

**Brúk fyri at skriva**

Peter Laugesen hevur skrivað eina ørgrynnu av yrkjum, søvnini frá honum eru nógv í tali, og hóast hann nú nærkast teimum sjeyti, er hann framvegis virkin yrkjari.

– Tað, sum drívur meg, er mín tørvur at formulera, hvør eg eri, hvaðani eg komi, og kanska hvagar eg eri á veg. Og so vóni eg, at tað, sum eg skrivi um meg sjálvan, kann siga fólki, sum lesa mínar yrkingar, okkurt um tey sjálvi, sigur Peter Laugesen.

– At skriva yrkingar er við til at halda meg á lívi. Mítt skriving ger meg nøkunlunda greiðan yvir, hvør eg eri, og eg havi støðugt brúk fyri at formulera tað fyri meg sjálvan fyri at verða til staðar.